27. apríl 2006

# Frásøgn frá setursráðsfundi nr. 3/2006

Tíð: Hósdagin 27. apríl 2006, kl. 13.00-14.45

Fundarstaður: Setursskrivstovan

Á fundi: Jóan Pauli Joensen, rektari
Hans Pauli Joensen, megindeildarráðsf. fyri NVD
Elin Súsanna Jacobsen, megindeildarráðsf. fyri SSD
Turið Sigurðardóttir, varamegindeildarráðsf. fyri FMD
Annika Sølvará, setursskrivari

**Dagsskrá:**

1. **Gjøgnumgongd og góðkenning av 2/2006 setursráðsfundi 23. februar 2006.** Góðkend.

2. **Góðkenning av dagsskrá.** Góðkend við ískoyti.

**Mál at taka støðu til / umrøða:**

3. **Mentamálaráðið hevur sett arbeiðsbólk, sum skal gera uppskot til nýggja lóg um Fróðskaparsetur Føroya ella Føroya Lærda Háskúla. Eisini skal bólkurin gera uppskot til lóg, ið heimilar landsstýrismanninum at leggja saman ella samskipa teir hægru útbúgvingarstovnar, ið geva útbúgvingar á í minsta lagi bachelorstigi. Arbeiðsbólkurin verður mannaður soleiðis: Rektarin fyri Fróðskaparsetur Føroya, rektarin fyri Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, rektarin fyri Føroya Læraraskúla og eitt umboð fyri Mentamálaráðið, ið verður formaður. Setursskrivarin og fulltrúi á Mentamálaráðnum verða skrivarar hjá nevndini.** (J.nr. 0010-01822). Rektarin og setursskrivarin kunnaðu um málið. Ætlanin hjá Mentamálaráðnum er at verða liðug við arbeiðið 1. oktober 2006. Setursskrivarin verður væntandi høvuðsskrivari, hetta kemur at taka nógva tíð og orku og kemur at ávirka annað arbeiði í hesum tíðarskeiðnum. Semja um, at setursráðið eigur at verða kunnað leypandi um málið.

4. **Umsókn frá Zakaris Svabo Hansen um farloyvi uttan løn í fyribils 1 ár frá 1.9.06 við møguleika fyri leinging.** (J.nr. 0022-00104). Umsóknin játtað. FMD og SSS arbeiða víðari við spurninginum um avloysara.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

5. **Setan av metingarnevnd til Ph.D.-ritgerð á Søgu- og Samfelagsdeildini. Tilmæli frá deildini: Finnur Magnússon, docent, fil.dr., Malmö, Beinta í Jákupsstovu, fyrstiammanuensis, dr. polit., Molde, Gestur Guðmundsson, professari á Kennaraháskóla Íslands, og sum varafólk, um onkrum berst frá, Kári Leivsson, aut.cand.psyk., Tórshavn.** (J.nr. 0042-00663). Setursráðið tók undir við tilmælinum. SSS tekur sær av málinum framyvir.

6. **Adjungerað fólk til Náttúruvísindadeildina.** (J.nr. 0021-01840). *Fundarskjal: Skriv frá Náttúruvísindadeildini, dagfest 24. apríl 2006 1 s.* Setursráðið tók undir við tilmælinum. NVD og SSS arbeiða víðari við málinum.

7. **Kunning frá deildunum o.ø.:**
   a. **Fundur á Náttúruvísindadeildini 2.3.06.** (J.nr. 0011-00013). Einki at leggja afturat.
   b. **Fundir á Søgu- og Samfelagsdeildini 21.3.06 og 20.4.06.** (J.nr. 0011-00012). Einki at leggja afturat.
   c. **Fundir á Føroyamálsdeildini 23.3.06 og 20.4.06.** (J.nr. 0011-00011). Einki at leggja afturat.

**Avgreiðslumál:**

8. **Próvdómaragóðkenningar at staðfesta** (J.nr. 0026-01525). **Eftir tilmæli frá ávikavist Náttúruvísindadeildini og Føroyamálsdeildini hevur Mentamálaráðið góðkent hesar próvdómarar:**
   **a. Bjørn Ursin, professari, ph.d. í ravmagnsverkfrøði við Universitetið í Tróndheimi til skeið *Innan kolvetnisverkfrøði.***
   **b. Ástráður Eysteinsson, professari í bókmentum við Háskóla Íslands.**

   Staðfest.

9. **Námsferðarstuðul 2006, játtanin er 100.000 kr. Tilmæli góðkent millum funda. At staðfesta.** (J.nr. 0071-01587). Staðfest.

**Kunningarmál:**

10. **Fíggjartøl:**
   **a. Mánaðarjavni ultimo desember 2005, 2. ískoytisskeið, nýtsla fyri alt setrið 19.063.700 kr = 100% av játtanarkarmi upp 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01365).
   **b. Mánaðarjavni ultimo mars 2006, nýtsla fyri alt setrið 4.122.000 kr = 21,6% av játtanarkarmi uppá 19.070.000 kr.** (J.nr. 0015-01595).
   **c. Nýtsla 2005 fyri rakstrarstaðið Stovnar á Debesartrøð 925.552 kr av játtan uppá 933.000 kr.** (J.nr. 0091-01397).
   **d. Nýtsla 2005 fyri Netumsitingina 696.549 kr (játtan 209.000 kr, inntøkur 473.520).** (J.nr. 0091-01397).
   **e. Grannskoðaður roknskapur fyri Altjóða summarskeiðið, sum var á Føroyamálsdeildini í august 2005.** (J.nr. 0040-01485).

11. **Beinta Arge er sett í hálvt skrivstovustarv á Náttúruvísindadeildini, hon byrjaði 1. apríl.** (J.nr. 0021-01808 og 0023-01817).

12. **Nýtt kappingarráð er valt fyri tíðarskeiðið okt. 2005 – okt. 2009. Í ráðnum sita Ingibjørg Berg, stjórnmálafrøðingur, Ingunn Eiriksdóttir, løgfrøðingur, Kári Petersen, búskaparfrøðingur, Leivur Michelsen, búskaparfrøðingur og Hans Jákup Mikkelsen. Ingibjørg Berg er formaður.** (J.nr. 0011-01723).

13. **Frágreiðing frá Landsgrannskoðanini um *mannagongdir og siðvenjur, tá ið ræður um ávísar útreiðslur: Ferðing uttanlands og dagpening fyri tænastuferðir, fartelefon og aðrar samskiftisútreiðslur, umboðan, starvsfólkaútreiðslur o.t. og bilar*. Frágreiðingin er úrslit av spurnarkanning, sum Landsgrannskoðanin hevur gjørt á almennum stovnum.** (J.nr. 0015-01740).

14. **Náttúruvísindadeildin og Sp.f. Marorka hava gjørt avtalu um samstarv.** (J.nr. 0043-1845).

15. **Innbjóðingar til ráðstevnur:**
    a. **KT-2006 í Norðurlandahúsinum 20.-21.4.06 "KT-2006 Frá filétfabrikk til idéfabrikk", Synergi samskipar KT-2006.** (J.nr. 0056-01809).
    b. **Ráðstevna um vælferðargransking "Den nordiske modellen" í Oslo 11.5.06.** (J.nr. 0057-01824).
    c. **Norðurlendsk lærararáðstevna á Læraraskúlanum í Havn 10.-13.5.06.** (J.nr. 0056-000154).

16. **Probana Aktiv Kurser kunnar um *Lederuddannelser og kurser via E-learning*.** (J.nr. 0057-00155).

17. **Útgávur:**
    a. **Sólfinn Hansen: "Endurreisn kvæðanna. Um støðufesti kvæðanna í føroyskum skaldskapi", Fróðskapur 2006. Bergur Rønne Moberg: "Tá søgan byrjar á staðnum", Mentunargrunnur Studentafelagsins 2006. *Grunnur Onnu Djurhuus til áminnis um Sverra Fon* hevur stuðlað hesum báðum útgávunum.** (J.nr. 0073-01534).
    b. **Ársfrágreiðing fyri fíggjarárið 2004, februar 2006, Landsgrannskoðanin.**
    c. **Ársroknskapur 2005, Føroya Sparikassi.**
    d. **Grein í Vinnuvitan 9.3.06 "Fróðskaparsetrið inn í vinnugransking", um samstarv við nýstovnaða felagið Marorka Føroya.**
    e. **Universitetsliv 2005, ársfrágreiðing frá Københavns Universitet.**
    f. **Redegørelse 2005, Perspektiv- og handlingsplan 2006, Minister for Ligestilling.**

Frágreiðing: Annika Sølvará